Ásetingar fyri øki C2: Vinnuøki – serstøk byggisamtykt fyri vinnuøki í grótbrotinum í Sandavági

Vinnuøkið grótbrotið í Sandavági verður broytt til serstaka byggisamtykt Vinnuøki C2

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 við seinni broytingum verða skipaðar hesar ásetingar fyri tað økið í Vága kommunu, ið nevnt er í grein 1.

1. Økið er avmarkað, so sum víst er á viðfesta fylgikorti 1, og fevnir um hesar ognir í Sandavági:
   Matr. nr. 245b og 61b, umframt allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi serstøku byggisamtykt verða frábýttir hesum ognum.
2. Økið verður lagt burtur av til vinnuøki og vinnubygging, t.e. heilsøluhandlar, goymslur, verkstaðir og ídnað og til tænastuvirksemi í sambandi við tey, bilstøðlar o.t.
3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5.
4. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 9,0 m. (miðal við húsahornini)
5. Loyvt verður at umvæla verandi hús, so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu, tó má byggingarstigið ikki fara upp um 0,5.
6. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 4. og 5. Þetti, í serstakari byggiætlan fyri hóskiligt, natúrligt avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0 og hæddin ikki uppum 12,0 m. (miðal við húsahornini)
7. Nærri ásetingar um virksemi vera gjørdir í leigusáttmálunum/ognarbrøvunum fyri hvørt grundstykki.
8. Hús og bygningar annars, kunnu bert verða bygd eftir byggiætlan sum Býráðið hevur góðkent.